# mar Festival

## Húsvognar

Øki er sett av til húsvognar, ið ætla sær at verða í Klaksvík á Summar Festivalinum. Nógvir húsvognar hava verið til festivalin undanfarnu árini, og soleiðis verður aftur í ár. Pláss til húsvognin kann umbiðast frá Norðoya Kunningarstovu.

## Ongar fløskur

Tað er ikki loyvt at taka fløskur – plast, glas, aluminum – ella blikk inn við sær á festivaløkið. Skeinking fer fram í plastbikørum á festivaløkinum.

## Bátar

Tað hevur verið ein rættilig innrás av smábátum á undarfarnu Summar Festivalinum, og tað rokna vit við aftur í ár. Nógvir bátar hava longu biðið um pláss, men enn eru onkur pláss eftir at fáa. Skipað verður soleiðis fyri, at smábátarnir kunnu koma at landi nærdindis festivaløkinum. Bátapláss skal umbiðast hjá Norðoya Kunningarstovu.

## Matur

Fyrireikararnir av Summar Festivalin gera í samstarvi við matstøð og onnur nógv burtur úr, at góður og ymiskur matur skal fáast á Summar Festivalinum.
Inn-staðið Hvonn í Havn letur upp í Klaksvík í sambandi við Summar Festivalinum, og Hvonn fer at selja dygdargóðar matvørur á sínum matstaði.
Pizza er populer millum føroyingar, og Pizzaria verður sjálvsagt á Summar Festivalinum.
Teir tiltiknu festival-búffarnir eru væl umtóktir, og Hotel Norð fer aftur á Summar Festivalinum at borðareiða við teimum vælsmakkandi búffunum.
Tað ber eisini til at keypa sær okkurt gott í pylsuvognum á økinum, og ein café verður eisini.
Harafturat verða fleiri skeinkingarstøð á festivalinum.

## Tjalding

Tað eru sera góðir møguleikar at tjalda í Klaksvík á Summar Festivalinum. Øki, sum Klaksvíkar kommuna hevur tøkt til hetta endamál, er stórt, og tað rúmast ein rúgva av tjøldum á hesum økjum. Tað er Norðoya Kunningarstova, sum umsitir leiguna av øki, og tey, sum kundu hugsa sær at sett eitt tjald upp í sambandi við festivalin, kunnu venda sær til Kunningarstovuna í Klaksvík á telefon 456939.

## Flags

Summar Festivalurin bjóðar í samstarvi við Føroya Tele eina nýggja tænastu í ár. Talan er um eina tíðinda- og kunningartænastu umvegis fartelefonina. Summar Festivalurin hevur fingið sítt serliga pláss á Flags, har tað ber til at lesa tíðindi og annað um festivalinum. Eisini liggur skráin fyri festivalin úti á Flags, og tí kunnu fólk altíð sláa upp í skránni umvegis fartelefonina.

